ítróttur

Nr. 4 • hósdagur • 5. januar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Ingi fekk ein hvøkk

**Ein vøddaskaði fyri jól mundi leiða minnini aftur á skaðaárini í Arsenal. Talan var tó um lítlan skaða, og væntandi verður Ingi partur av hópinum, tá eykaliðið hjá Birmingham spælir dyst komandi mánadag**

ÚTISETI
*Jákup Mørk*

Fremsta orsøkin til, at Ingi Højsted í fjør valdi at koma aftur til Føroya, vóru mongu skaðarnir, sum støðugt argaðu føroyska spælaran í Arsenal. Skaðar, sum seinasta árið høvdu við sær, at Ingi ongantíð av álvara kom í ta venjingarstøðu, sum er krav í einum enskum stórfelag.

Í fjør gekk tó øðrvísi betri. Við B36 var hann partur av liðnum, sum gjørdist føroyameistari. Ingi varð eftir kappinginarárið kosin sum ársins stjørnuskot í føroysku landskappingini, og hann megnaði eisini at bíta seg fastan á landsliðsmiðvøllin. Alt avrik, sum tilsamans førdu til eina endurupplívan av yrkisdreyminum, tá Birmingham seint í fjør gjørdi sáttmála við Inga.

Síðani hevur Ingi vant við Birmingham, men



*Spæliloyvi er nú komið til Onglands, og vónandi verður Ingi partur av hópinum hjá Birmingham, tá eykaliðið mánadagin skal takast við Manchester City*

stutt fyri jól fekk hann ein lítlan hvøkk. Hetta tá teir í felagnum eftir lokna venjing runnu nakrar stuttar spurtir.

– Talan var tíbetur ikki um sama slag av skaða, sum Ingi fyrr hevur havt trupulleikar av. Hann fekk frí í nakrar dagar, og tað hevur loyst trupulleikan, sigur Jákup í Stórustovu, sum er umboðsmaður hjá Inga.

Eftir at fyrsti mánaðurin bert hevur boðið upp á venjing hjá Inga, vónar føroyski spælarin nú, at dystir eisini koma á skránna. Spæliloyvið varð flutt til Onglands um ársskiftið, tá sonevnda transfer-vindeygað aftur læt upp, og tí kann Ingi nú spæla dystir fyri nýggja felagið. Eisini í Premier League, um boð verða eftir honum.

Í fyrsta umfari er tó væntandi, at talan verður um dystir á eykaliðnum. Hesir skulu mánadagin spæla móti Manchester City, og so verður spennandi at síggja, hvørt Ingi verður í hópinum til tann dystin.

# Spennandi KÍ-síða

Tað er at kalla ein sjálvsøgd uppgáva hjá einum ítróttarfelag í fremstu røð, at hetta eisini hevur sína egnu heimasíðu. Slíka hevur KÍ eisini havt í fleiri ár, og sum so mundi felagið eisini vera millum pionerarnar í hesum. Ikki minst tí KÍ saman við HB í drúgva tíð var tað felag, sum hevði best umtóktu fótbóltsheimasíðuna.

Seinasta árið hevur tó verið so sum so við dagføringunum á síðuni. Einamest, tí orkan fyri tað nógva hevur verið løgd í at gera n‡ggja heimasíðu. Dagfestingin fyri, nær nýggja síðan skuldi koma á netið, hevur fleiri ferðir verið útsett, men nú er bíðitíðin so av.

Á slóðini www.ki-




klaksvik.fo kemur nú spildurnýggj heimasíða fram, har tíðindi frá bæði KÍ og Stjørnuni eru at síggja. Enn eru dagføringarnar ikki so nógvar og nýggjar, men sum skilst, so verður arbeitt við at eisini hesin parturin skal gerast meira støðugur. Og verður hann tað, so er einki at ivast í, at bæði KÍ-fjepparar og onnur tá hava eina síðu, sum verður eitt sera áhugavert vitjunarstað.

**-mørk**

# Tottenham heldur kósini

**Tottenham vann í gjárkvøldið torføra útidystin ímóti Manchester City og heldur harvið fast um fjórða plássið**

PREMIER LEAGUE
*Stefan í Skorini*

Við einum máli í hvørjum hálvleiki tryggjaði Tottenham sær trý týdningarmikil stig í einum annars sera torførum útidysti.

Robbie Keane skoraði til 1-0 fyri steðgin, og egyptarin Mido økti til endaligu støðuna 2-0 í seinna hálvleiki.

Við hesum úrslitinum liggur Tottenham framvegis væl fyri á fjórða plássi, og útlit eru fyri, at Spurs fer at vinna sær luttøku í Champions League fyri fyrstu ferð nakrantíð. Liðið er bert eitt stig aftanfyri Liverpool, og hetta var eisini fjórðu ferð uppí slag, at málið varð hildið reint.

---

# Chelsea leigar Maniche

Ensku meistararnir úr Chelsea hava styrkt liðið við portugisiska miðvallarleikaranum Maniche, ið Chelsea hevur lánt úr Dynamo Moskva, tað sum er eftir av kappingarárinum, hetta skriva heimasíðan hjá felagnum.

Maniche er læntur sum avloysari fyri Michael Essien, ið er skaddur í løtuni. Maniche eitur í veruleikanum Nuno Ricardo Oliveira Ribeiro, og hevur áður spælt undir Chelsea venjaran José Mourinho í Benfica og Porto.

Í Porto var sterki miðvallarin ein av stuðulsspælarunum á liðnum, ið vann tvey portugisisk meistaraheiti, steypafinaluna, UEFA Cup og Champions League. Hann hevur harumframt verið ein týdningarmikil spælari á portugisiska landsliðnum, síðan hann spældi fyrsta dystin í 2003.

Maniche fall ongantíð til í Dynamo Moskva, aftan á at hann í summar var keyptur úr Porto, sum dýrasti leikari nakrantíð í russiskum fótbólti fyri 16 milliónir Evrir.

**-NuD**